SOSIALURIN

Prentsmiðjan á Høvgsbrøyt
tlf. 1820

Blaðstjórn:
Villi Sørensen
tlf. 5479 — Klakksvík
Jákup Lindenskov
tlf. 2209 — Tórshavn

Fylking frá øllum flokkum

FÓLKA- og sambandsmaðurin D. P. Danielsen fríggjar til tjóðveldismenn, ið nú ganga og harmast yvir, at tjóðveldska-sambandsafturhaldið hevur dripið teir politiskt.

MEN hvussu kunnu teir tjóðveldismenn, sum siga siga at vera sosialistar — fara at velja fólkaflokksmann, sum bara á skræðuni eru sjálvstýrismenn, men í hjarta og gerðum, heima sum úti, á tingi sum á danatingi einki annað eru enn konservativir sambandsmenn.

JAVNAÐARMENN hava sum samrikismenn í gerðum og í talu, úti sum heima, á løgtingi sum niðri á danatingi verið nógv betri og hollari fyri sjálvstýrisframtøk enn fólkaflokksmenn.

Í HESUM sambandi er at vísa til stjórnarskipanina við skrásetingini av *føroyska flagginum, føroyska málinum sum høvuðsmál føroyinga. Lóggávuvaldi, føstum rætti* til alla yvirtøku

SAMRÁÐINGARRÆTTI við útlandið um okkara áhugamál og rætt at fáa sett mann í uttanríkisráðið og menn á donsku uttanríkisumboðsstovurnar.

OG SO kunnu nevnast: 12 mila markið, sjálvstøðugan sess í norðlendska ráðið, føroyskt sum lærugrein við universitetið í Danmørk o.s.fr.

ØLLUM hesum hevur fólkaflokkurin spent ímóti.

TAÐ vildi verið rímiligt, at allar sosialistiskar kreftir løgdu saman við javnaðarmonnum, bæði innan fyri tjóðveldið, sjálvstýrið, ja eisini innan fyri sambandið og fólkaflokkin.

VIT siga hetta, tí vit vita at tað eru nógvir menn og nógvar kvinnur innan fyri hinar flokkarnar, sum leingi hava hugsað um at fylkjast við javnaðarmonnum fyri at fremja ein sosialistiskan uppbyggingarpolitikk.

HESAR kreftir, hesir menn og hesar kvinnur fylkist nú við javnaðarmonnum til fólkatingsvalið tann 13 í hesum!

FYLKIST SOSIALISTISKT!!!

viðmerkingar

Ungdómurin ger um seg

Tað frættist ikki bara út um landið, men tíðliga sunnumorgunin visti eisini útheimurin at siga frá tíðindum um herverkið, ið gjørt var á Sjónleikarhúsið leygarkvøldið.

Eingin kann annað enn harmast um, at slíkt kann fara fram, og eig ur slík framferð at fordømast harðliga.

Men ungdómurin í Havn hevur ikki nógvar staðir at fara, tá dansistovan er stongd, at stuttleika sær.

Mistak segðist vera komið í, at biografstjórin hevði selt bilettir og samstundis boðaði Sjónlekarhúsið í útvarpinum frá, at dansur skuldi vera. Men har var eingin dansur.

Men hetta gevur monnum nakað at hugsa um. Okkara ungdómur eig ur at fáa atstøður at koma saman í friløtunum, og ungdómur leitar hagar ungdómurin kemur saman.

Tað er eisini ein landsuppgáva, so væl sum ein kommunal uppgáva, at høvuðsstaðurin er soleiðis fyri, at hann hevur hølir til allan tann nógva ungdóm, sum veksur upp í Havn, eisini ungdómur sum kemur til Havnar at búgva seg út.

Gevið ungdóminum og teimum, sum fáast við ungdómsarbeiði umstøður at arbeiða. Tað er ongantíð ov nógv givið til tess. Og tað er altíð góð ílegging, at betra um kor ini hjá tí unga ættarliðinum.

Henda álvarsama hendingin, sum fór fram leygarkvøldið uttanfyri Sjónleikarhúsinum, eigur at geva nógv at hugsa um.

Til føroyska búnan

Í løtuni stórt og fjølbroytt úrval til føroyska búnan.

Ringið ella skrivið!

Allir bygdaordrar verða avgreiddir við tað sama.

EILIF ARGE, ursmiður
tlf. 5764 — 5174

Haldið Sosialin!

Bræv til Sosialin

AFTURSVAR

til hr. Svend Jensen — og frágreiðing um mína støðu í spurninginum um iskoyti úr kommununkassanum, til prisin á útróðrafiski.

Sosialurin, Tórshavn. Gerið so væl og hýsi mær hesi grein í blaði tygara skjótast møguligt:

Ikki dámar mær at skriva í bloðunum, um tað tú skrivar Svend, men tú roynir at dálka meg ogiligt til, so eg fari ikki at lata tína grein í Sosialinum standa ósvaraða. Fyri umleið einari viku aðrenn greinin kom í Sosialin, visti eg um hetta, men tá var ikki avgjørt hvør skuldi undirskriva greinina. At tú varð, hann, sum er best skikkaður, er kanska ikki so løgi. Eg skilji nú, at tú ætlar tær uppi partapolitikk so tað skal siggjast, og eftir grein tini, er mær heldur ikki so óhugsandi, hvør vil hava teg sum arvtakara. Politikkin í grein tini fari eg ikki at gera meira við, tí politiska øsingarskrivingin um okkara kommunuviðurskifti býður mær ímóti.

Tú slongir um teg við tolum innan kommunuroknskapin, sum um tú einki annað hevur gjørt heila títt liv. Eg havi ikki roknað við, at tú hevur títt taltilfar frá bókhaldara kommunurnar, og sigur hann, at tað hevur tú heldur ikki. So er spurningurin, hvar hevur tú so taltilfarið frá? Síðani eg kom í søknarstýrið er hvørt ár prentaður ein rokniskapur pr. hús, og kann hvør familja, sum hevur hug, fáa eitt eintak frá kommunuskrivstovuni. Ring inn, og tú fær eitt eintak í postinum dagin eftir. Ongantíð hev ur rokniskapur kommununnar verið lættari tilgongiligur og greinligari at tosa um enn iúst tú, men tey tol, tú skrivar um, skilir tú helst einsamallur. **Eg fari við hesum at bjóða tær persónliga heim til mín fyri at tosa um og geva tær hovi til saman við mær at kanna seinastu roknskapar kommunurnar, og síðani kunnu vit báðir senda eina felagsfrágreiðing til blaðini** um tað, tú hevur skrivað í Sosialinum. Til lesaranar vil eg eg siga, at kemur ongin felagsfrágreiðing frá okkum, so hevur Svend Jensen ikki tikið við mínum tilboði um at fáa viðurskiftini gjølla upplýst, og enn minni at standa til svars fyri tí hann skrivar.

Viðvíkjandi spurninginum um prisiskoyti til útróðrafisk

Eg eri fleiri ferðir skemdarliga álopin í Sosialinum um hendan spurning, og loyvi eg mær tí at geva hesa frágreiðing:

Um heystið 1963 fekk søknarstýrið áheitan frá útróðrarmonnum á Tvøroyri um at geva eitt prisiskoyti til útróðrafiskin við 2—5 oyru pr. kg til at frakta fiskin til Klakksvíkar, ella eisini at verða út róðramonnum til hjálpar við at fáa avtalu við stórri skip at ferma fisk in til bretska marknaðin. Søknarstýrið royndi beinan vegin at fáa hendur á skipið, ið vildi leggja til, at taka fisk frá útróðrabátunum, men var hetta ikki gjørligt at fáa í lag. So varð spurningurin um stýrið skuldi lata eitt prisiskoyti sum umbiðið, meðan samráðingar fóru fram við fiskakeyparar í Suðuroy.

Hetta er í sær sjálvum ein spurningur, sum sjáldan sæst innan kommunugátt, og tí ivingarsamur, annaðhvørt hann hoyrir undir kommunalt virkisøki ella ikki. Ringt er at fáa ov lítið fyri tær vørur, ein vil og kann selja, og skiltu vit tí allir í søknarstýrinum, at útróðramenn royndu at fáa søknarstýrið at játta umsøkta tilskot. Í byrjan av viðgerðini settu vit okkum sjálvar tí hesar spurningar:

1) Hevur líknandi sak fyrr verið viðgjørd í kommununi?

2) Ffall prisiskoytið verður játtað, kann so roknast við, at aðrir, ið fingu ov lítlan pris fyri sínar vørur, t.d. kolamenninir, eisini kundu hugsað sær at søkt um prisiskoyti frá kommununi?

Til 1) varð upplýst okkum: Í 1959 ella 1960, tá útróðramenn ikki kundu sleppa av við fisk sín vegna streiku, leigaðu teir skip norðaneftir at flyta fiskin til Bretlands. Hesi skip vildu hava garanti fyri 5.000,— kr. Somu útróðramenn heittu á kommununa um at hjálpa teimum við at garantera fyri umrøddu 5000 kr. **Hetta segði táverandi søknarstýri (við javnaðarleiðslu) nei fyri.**

Til spurning 2) varð hildið, at tað lætt kundi hent, at onkur annar eisini kom at biðja um prisiskoyti. **So var,** ca. 1½ ár seinni í 1965, heittu kolamenninir á kommununa um peningastuðul, tí teir fingu ov lítið burtur úr teirra fram leiðslu. **Núsitandi søknarstýri var einmælt samt um,** at ikki bar til at ganga kolamonnunum á møti.

Eftir var nú at taka endaliga støðu um iskoyti til útróðrarprisin. Eg sat sjálvur sum formaður í 1963, og spurdi eg tí hvønn søknarstýrislim sær, hvørja støðu hann tók í málinum. Ó-menninir meintu at tað principielt ikki var ein ein kommunalur spurningur, beinleiðis at játta pening sum iskoyti í slíkum umstøðum. Javnaðarmenn tóku ta støðu, at tá vit ikki kundu hjálpa útróðrarmonnum við at fáa hendur á skipi at føra fiskin til Bretlands, so skuldu vit játta teimum 2—5 oyru pr. kg sum studning til ferming av fiskinum til Klakksvíkar. Nú var bert ein spurningur eftir, hvat støðu tók eg sjálvur sum uttanflokkaður. Hon var í stuttum henda: Í prinsippinum helt eg ikki hetta var ein spurningur, sum beinleiðis hevði við kommunalt mál at gera; men eg helt tað vera vánaumstøður, útróðramenninir vóru komnir í. Eg helt tað eisini vera vánaumstøður, **at arbeiðsfólk á landi** skuldi siggja fiskin, teir og tær skuldu virka, fara av bygdini, og í tríðja lagi helt eg tað vera ringt skil, at inntøkan hjá fólki av hesi orsøk skuldi verða skerd. Hetta kom fyrst tvørt fyri hjá lønmóttakara, og síðani ger hetta at samlaða inntøkan hjá kommununi gerst minni.

Av tí at javnaðarmenn vildu, at studningur var játtaður úr kommununkassanum, kundi eg tenkt mær at gingið við til hetta, tó soleiðis, at útróðramenn her fingu sama pris, meðan samráðingarnar fóru fram, sum útróðramenn í Klakksvík, **men á slíkan hátt, at fiskurin varð verðandi her í søknini til virkingar. Eg meinti ikki tað var heint, at vit bruktu pening úr kommununkassanum at ferma fisk fyri til Klakksvíkar, so at klakksvíkingar fingu meira arbeiði,** orsakað av **studningi úr okkara kommunukassa, meðan okkara arbeiðsfólk stóð og hugdi at, at teirra egna arbeiðsinntøka fór norður eftir, partvis fyri teirra egna pening.** Eg spurdi javnaðarmenn um teir vildu taka undir við mínum sjónarmiði, og á tann hátt fáa eina fyribils gongd á útróðrar- og arbeiðsviðurskifti okkara, **soleiðis, at eisini okk ara arbeiðsfólk kundi fáa ágóða av prisiskoytinum frá kommunni? Hetta sogdu javnaðarmenn nei til!!!** Teir vildu bert ganga við til at játta prisiskoyti soleiðis, at fiskurin var sendur burtur frá bygdini. Hví???

Eg vildi ikki vera við til at játta studning úr kommunukassanum og senda fiskin burtur. Tá javnaðarmenn ikki vildu styðja meg í hesum og B menninir prinsipielt tóku somu støðu sum javnaðarmenn í 1959—60, var stutt sagt eingin møguleiki fyri at umsóknin frá útróðrarmonnum kundi fáa sømdir, og varð henda avgerð skrivað teimum í brævi sama dag.

Eg fati ikki hví javnaðarmenn í Sosialinum bliva við at loypa á meg. Tit vildu ikki vera við til at royna einasta møguleika fyri táverandi loysn av umsóknini til kommununa.


Í blaðskrivingini verði eg ofta spurdur um, hví eg ikki kom og tosaði við útróðrarmenninar — sum vóru staddir í Fylking — um málið. Henda áheitan kom aftaná at málið var avgjørt í kommununi, og helt eg tá og haldi enn, at her var tiverri einki meira at tosa um uttan at greiða teimum frá, hvussu viðgerin fór fram á søknarstýrisfundi. Tað vildi verið ógvuliga tómligt, bert at greitt frá, at javnaðarmenn ikki kundu góðtaka mítt sjónarmið og harvið loysa málið fyribils, eins og tað vildi verið at tikið mær persónliga vinning í málinum. Tað haldi eg søknarstýrismál vera ov góð til, eins og eg haldi tann hvassa skriving og og tað hvassa øsingartos um okkara søknarstýrisviðurskifti, ikki ber okkum bata.

Tvøroyri, 26. nov, 1966.

Einar Larsen.

Føroya Bjór

Jólaøl



Tað vælumtókta FØROYA BJÓR JÓLAØLI er nú komið í handlarnar.
Vilja tygum hava nakað framúrskarandi jólaøl, so bið sjálvandi um FØROYA BJÓR JÓLAØL, betri fæst ikki.

†

Tað kunngerst fyri ætt og vinum, at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

ANGELICA HENRIKSEN

andaðist sunnudagin 4.12.1966.

Jarðarferðin verður frá kirkjuni hósdagin 8.12. 1966 í Gamla kirkjugarð.

Fyri tey avvarðandi
J. P. Henriksen.

SKULA TIT BRUKA BIL

persónkoyring ella skúlakoyring, so snarið tlf. 3456

Alexander Dalfoss

